DAGSINS MEINING

Viðkomandi vitan

Tey seinastu árini hevur áhugin fyri arbeiðsumhvørvi og livikorum verið vaksandi. Virki geva arbeiðsumhvørvinum størri ans, tiltøk sum Ársins arbeiðspláss og orðaskifti um tørvin á almennum reguleringum siga eitt sindur um hendan áhuga. Tað hevur tó verið ein sannroynd, at áhugin mest er komin til sjóndar í sambandi við arbeiði á landi. Fiskiflotin sum arbeiðspláss og arbeiðsumhvørvi hevur líkasum ikki havt tann stóra almenna áhugan hjá fjølmiðlum og myndugleikum. Hinvegin hava Fiskimannafelagið og FF-blaðið altíð sýnt hesum evni stóran ans.

Tað er tí at fegnast um, at vit nú hava fingið eina kanning, sum greiðir frá arbeiðsviðurskiftunum og umstøðunum hjá fiskimonnum til skips. Tað er sjúkrarøktarfrøðingurin Anna Maria Simonsen, sum hevur gjørt kanningina. Hon hevur arbeitt á oljuboripallum viða hvar, og har hevur hon sæð, hvussu ómetaliga nógv, ið verður gjørt til tess at bøta um trygdina. Hon er tí sera áhugað í trygd og arbeiðsumhvørvi umborð á fiskiskipum. Anna Maria Simonsen hevur í hesum sambandi hugsað, at í minsta lagi sama trygd eigur at verða fiskimonnum fyri umborð á fiskiførum sum starvsfólki á boripallum er tryggjað. Fiskimannafelagið hevur ivaleyst somu áskoðan. Kanningin snýr seg ikki bert um tað fysiska umhvørvið og trygdina umborð, men eisini um, hvussu tað kenst at vera til skips. Eisini vísir kanningin hvørji ynski fiskimenn hava til tilveruna sum fiskimenn og hvørji krøv, ið teir seta til arbeiðsplássið umborð. Hetta er forvitnisligt og áhugavert og her er talan um sera viðkomandi vitan. Alt talar fyri, at hildið eigur at vera fram við slíkum kanningum.

Kanningin er vorðin stuðlað av Føroya Fiskimannafelag, hvørs formaður stútt og støðugt virkar fyri at bøta um korini hjá sínum limum. Nú fara formaðurin Óli Jacobsen og Anna Maria Simonsen til Alaska at leggja fram úrslitini av kanningini á altjóða ráðstevnu um arbeiðskor á fiskiskipum. Tað er gott fyri fiskimenn um allan heim, at teirra kor verða umrødd. Tað er eisini sera positivt fyri Føroyar sum fiskivinnutjóð, at okkara umboð kunnu leggja fram nýggj, viðkomandi og týðandi kanningarúrslit í einum altjóða forumi í aðrari fiskivinnutjóð, nevniliga Alaska. Vónandi kemur nógv gott burturúr ráðstevnuni. Eisini er at vóna, at allir viðkomandi partar framyvir fara at stuðla og menna gransking innan trygdar- arbeiðs- og heilsuøkið hjá fiskimonnum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fyrispurningur til Bjarna Djurholm

Í sambandi við flytisøkir til alingina í Suðuroynni og hvørjir karmar annars, fólkaflokkurin ætlar alivinnan í Føroyum framhaldandi skal hava at virka undir

Johan Dahl
løgtingsmaður

Sum flestu kunnugt, so er Suðuroyggin enn einferð við at verða jarðløgd sum aliøkið orsakað av óhappum, ringum marknaðarprísum – og sum stein omaná byrðu ILA sjúku.

Tað skulu sera breiðir fíggjarligar herðar, at bera slík bakkøst og hava bæði bankar og ánarir gjørt tað sum er møguligt innan verðandi fíggjar og lógarkarmar fyir at bjarga alingini her suðuri.

Tá vit tosað um skiftisøkir orsakað av ILA, so vita vit at Suðuroyggin eigur at hava bestu møguleikar, við fleiri firðum sum skiftast kann ímillum um viljin er til staðar.

Nú ILA er staðfest og firðir verða braklagdir í ávíst tíðarskeið orsakað av smittuvandanum, eigur og skal verða møguligt at nýta aðrar tøkar firðir.

Í hesum sambandi veit eg at spurt hevur verið hjá Vinnumálastýrinum, um loyvið at brúka Hvalbiarfjørð til endamálið, men hetta verður noktað, hóast tað við einum lítlum sindri av vilja frá Vinnumálastýrinum væl skuldi borið til.

Bjarni Djurholm, – eg vil hervið vinarligast heita á teg, um at vísa teg frá sólsíðuni og geva loyvið til, at Atlantic Seafarms kann fáa loyvið at nýta Hvalbiafjørð sum skiftisfjørð/aliøki.

Hví verður hetta ikki loyvt?

Er tað nøkur serstøk orsøk til noktandi svarið, sum tit hava givið tá heitt hevur verið á tykkum um hetta?

Eg vil her eisini siga, at eitt svar sum evt. sigur, at við verðandi støðu í alivinnuni í suðri, so er tað útilokað – tað er onki svar, tí fyri at komað viðari við alivinnuni í Suðri, so er neyðugt m.a., at hava møguleika at skifta millum firðirnar.

Minst til orðataki: »betur er bøtandi hond...«

Eisini vil eg fegin vita hvat tit ætla at gera við avmarkingarnar í ílogum í alivinnuna fyri útlendingar?

Tað verður sera trupult at endurreisað nakra alivinnu uttan m.a. útlendskan risikovilligan kapital og fyri at fáa hann so er neyðugt at geva rúmari ræsur í sambandi við avmarkingar fyri eigaraskapið hjá útlendingum.

Kanska kundi eg fingið at vita hvat landsstýrismaðurin í vinnumálum og flokkur hansara ætlar at gera í hesum samband við nevndu viðurskifti?

Hvussu liberalir er tit í fólkaflokkinum veruliga, tá kemur til stykkis, tá tað snýr seg um altjóðagering,tey fýra frælsini, tað at hava eina fría vinnu og slogani at standa á egnum beinum?

Alfred! Hvussu við bergholinum til Dals?

Gerhard Lognberg
løgtingsmaður

Eg las greinina hjá Alfred Olsen, løgtingsmanni um Sandoy við áhuga. Eitt er vist: vit gleðast um at aðrir og onnur leggja til merkis, hvussu trupult mangan útjaðarin hevur tað, ikki minst tær smáu útoyggjarnar. Alfred nevnir læknarnar, hann nevnir Teistan og undirsjóvartunnilin.

Tað er rætt at ein tunnil til Sandoynna er tað einsta rætta, tí útjaðarin fær tað verri og verri. Vit løgtingsmenn í Sandoy løgdu í síðstu tingsetu uppskot fram um undirsjóvartunnil og fekk tað heilt positiva viðgerð millum tingfólk.

Hetta sum er hent í summar at Teistin hevur verið á beding í 4 mánaðir er jú stór skomm og ein háðan av Sandoy.

Hvussu við vegakervinum í Sandoy, henda oyggin sum er so sløtt og skuldi verið góð at gjørt vegir á?

Vit hava bygdina Dalur, tað er ikki tespiligt at koma til hesa bygd, har er næstan ikki framkomandi á vetri. Hvussu er við vegnum ígjognum Sandlið? Har er ikki minni vandamikið at ferðast ígjognum.

Okkurt positivt er nettup nú um dagarnar. Arbeiðið uppá vegagerðina frá ferguleguni í Skopun er byrja, og hetta arbeiðið fer at bøta ómetaliga nógv um atkomumøguleikarnar til ferguna. Hetta arbeiði verður gjørt gjognum 3 fíggjarár, og hetta eri eg ómetaliga glaður um.

Men tað sum fekk meg til at taka pennin var nettup at Alfred Olsen, løgtingsmaður harmast um hvussu Sandoy er viðfarin. Hví rætti tú ikki ein hond tá eg sjálvur legði broytingaruppskot til aðru viðgerð av tingmálið nr. 1-1/2002 tann 16/2 2002. Í viðmerkinunum sigi eg at farleiðin millum Húsavík og Dal er sera hættislig, tí vegurin er smalur, liggur í brattlendi og grót ríður støðugt oman á vegin.

Tað sum eg vil siga í hesum skrivi er, at eg góðtaki avgjørt ikki at ein maður kemur við føgrum orðum, og ger beint ímóti tá hann hevur møguleikan at hjálpa Sandoy.

Sagt bart út: Alfred Olsen løgtingsmaður atkvøddi ímóti at peningurin var játtaður til berghol ímillum Húsavík og Dal.

Men Alfred, eg gleðist til vit báðir koma í samgongu og vit kunnu sláða eitt slag fyri Sandoy.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Kommunalu bingjuplássini enn einaferð

IRF

Ofta verður tikið til, sum seinasta fríggjadag í Norðlýsinum, at IRF heldur ikki ella ruddar ikki síni ruskpláss ella bingjupláss. Men IRF eigur eingi bingjupláss. Bingjuplássini eru kommunal ogn og kommunan hevur ábyrðina av at reka plássini og at halda tey og øki kring tey ruddilig. Uppgávan hjá IRF er at lata bingjur til plássini og at tøma bingjurnar.

Skipanin frá byrjan

Í eini grein í Dagblaðnum í mai 1989 skrivaði táverandi nevndarformaðurin í IRF, Jógvan Isaksen, soleiðis um kommunalu bingjuplássini.

Á hesum bingjuplássum verða í minsta lagi ein bingja til tað, sum skal brennast, og ein til tað, sum ikki skal brennast. Á teimum størru plássunum kunnu verða fleiri bingjur av hvørjum slag.

Nøgdin av bingjum er sett soleiðis, at fyri hvørji umleið 500 fólk verður ein bingja til tað, sum skal brennast, umframt ein bingja til tað, sum ikki skal brennast. Bingjurúmdin svarar sostatt til, at hvørt húsarhald hvørja viku kann sleppa av við umleið líka nógv burturkast (á bingjuplássinum, undr.), sum ein vanligur ruskposi tekur.

Bingjuplássini eru bert ætlað vanliga húsarhaldinum og eru sostatt ikki til handlar og virki. Tey skulu sjálv hava bingjur ella aðra avtalu við IRF.

Soleiðis var ætlanin at bingjuplássini skuldu virka, tá IRF byrjaði sítt virksemi, og soleiði er framvegis ætlanin at bingjuplássini skulu virka. Men siðir broytast.

Verandi skipan

Síðani IRF byrjaði sítt virksemi er staðfest í kunngerð frá 1995, at kommunan skal hava móttøkustað (t.d. bingjupláss) til burturkast frá borgarunum.

Heilsufrøðiliga starvstovan hevur síðani 1998 sett størri krøv til skiljing og viðgerð av burturkasti í fylgiskjali til umhvørvisgóðkenningar hjá IRF.

Aðalfundurin, sum er hægsti myndileiki hjá IRF, samtykti í 1999, at IRF skuldi fara undir endurnýtsluskipanir til metal, plast og pappír.

Størri krøv verða sett til burturkast, sum skal endurnýtast, enn til burturkast, sum skal brennast ella tyrvast. Av tí at ein stórur partur av gomlum jarni, gomlum bildekkum og pappi til IRF kemur av kommunalu bingjuplássunum, er neyðugt at hava góðar skiljimøguleikar á teimum. IRF hevur tí tey seinastu fýra árini heitt á kommunurnar um at skipa bingjuplássini betri. Millum annað hevur IRF mælt til, at:

- plássini bert eru opin ávísar tíðir
- plássini eru mannað, tá opið er
- plássini bert taka ímóti burturkasti frá húskjum
- tað skal í minsta lagi vera møguligt at skilja burturkast soleiðis:
- tað, sum skal brennast
- pappír & papp
- jarn & metal

Fleiri av størru kommununum hava seinastu tvey árin gjørt eitt munagott arbeiði á hesum øki, meðan flestu meðalstóru og smærru kommununum halta eftir, men undantøk eru. Nógvar av smæstu kommununum hava enn einki bingjupláss.

Bingjuplássini eru framvegis bert ætlaði til burturkast frá vanligum húsarhaldi svarandi til ein ruskposa um vikuna íroknað hvítvørur, elektronisk tól v.m.

Sjálvstøðug vinnurekandi, handlar, stovnar og virki í limakommununum skulu seta seg í samband við IRF viðvíkjandi burturkasti. Hetta skula vanligir borgarar eisini gera, um teir hava serliga stóra nødgir av burturkast, t.d í sambandi við umvalingar av sethúsum og tílíkt.

Ole Ivars hevur tvær framførslur

TÍÐINDASKRIV

Áhugin fyri dansinum við norska bólkinum Ole Ivars er so stórur, at nú verður skipað fyri einum tiltaki afturat. Ole Ivars fara at spæla í Havn og í Fuglafirði

Ole Ivars er kanska best umtókti bólkurin av sínum slagi í Føroyum. Teir spæla lættan dansitónleik, og við sangum sum »Nei, så tjukk du har blitt« og »Jag trodde Änglarna fanns« hava teir vunnið hjørtunum á mongum føroyingi.

Fyrst í september mánaði kemur bólkuri fyri fyrstu ferð til Føroya at spæla, og dansur verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn leygarkvøldið 6. september. Áhugin fyri hesum tiltaki er so stórur, at nú verður eisini skipað fyri einum dansi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hesin dansur verður fríggjakvøldið 5. september.

Ole Ivars hava spælt síðani mitt í 1960'unum, men teir hava ongantíð áður verið so væl umtóktir, sum teir eru í hesum døgum. Seinastu fimm árini hava verið tey bestu hjá bólkinum, sum selir eina ørgrynnu av fløgum og altíð er á ferð.

Limirnir í bólkinum siga, at teir gleða seg serliga nógv til at koma til Føroya at spæla, tí tað er nakað nýtt fyri teir, og teir vita, at teir hava nógvar lurtarar í Føroyum.

Søgur úr Krabburð á Glyvrum

TÍÐINDASKRIV
Mentanarhúsfelagið í Runavíkar Kommunu

Hvørt mansbarn kennir Sámal Mathias, sum tær seinastu vikurnar hevur stríðst við tunnuna í søgunni um rekamannin, sum aftur hevur verið á skránni í Útvarpinum; meistarliga lisin av Oskari Hermansyni, sála. Søgurnar úr Krabburð hjá Jens Paula Heinesen hava leingi verið fólkaogn, og ein partur av teimum er settur upp sum sjónleikur av bólkinum Grímu.

Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu hevur heitt á Grímu at koma framfóra leikin fyri eysturoyingum. Súsanna Tórgarð hevur leikstjórnað, og Bárður Persson og Hans Tórgarð hava einar tíggju leiklutir í part, tá teir einsamallir føra fram tríggjar av søgunum í Krabburð í skúlanum á Glyvrum sunnudagin 7. september. Søgurnar um sambandsmannin Tarnovius, sjálvstýrismannin Bartal á Heimabeitið, javnaðarmannin Kaj Erik hjá Marini og øll hini vóru skrivaðar í trýssunum, men politiski hugsunarhátturin í Føroyum er lítið og einki broyttur. Og ikki er tað stórur munur á føroyskum »orginalum« tá og nú. Gamli Balteus, kongsbóndin Peter Ludvig Højhauge, Ábraham, Albana og Hanna Malena fara á valfund, keypa skip, og taka ímóti Kongi í Krabburð, og tað er ikki bara gamansleikur,ið spyrst burturúr. Sýningin er ætlað bæði gomlum og ungum, børnum og vaksnum. Hóast innihaldið kanska mest er fyri vaksin, so eru fólkið í Krabburð so løgið og stuttligt, at børnini kanska fáa mest burturúr.

Søgurnar úr Krabburð verða sýndar í skúlanum á Glyvrum sunnudagin 7. september kl. 17.00. Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni í Saltangará og við dyrnar.